# Eriksson fer ikki til Chelsea

Tað fekk ensku miðlamaskinuna ígongd, tá Manchester City venjarin, Sven Goran Eriksson, varð sæddur millum áskoðararnar til dystin millum Manchester United og Chelsea. Alt fyri eitt ljóðaði mest sum fyri vist, at Eriksson skuldi gerast nýggjur venjari í Chelsea, men hesum noktar sviin púrasta blankt. – Eg havi als ikki tosað við Abramovich, og tað er einki hald í hesum. Um arbeiði í Manchester, og tá Manchester United og Chelsea spæla her, er tað væl náttúrligt hjá mær at hyggja. Gjørdi eg ikki tað, so vildi eg mest sum vanrøkt starv mítt, heldur Eriksson.

## formuladeildin

**Formula-deildin**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 23 | 16 | - | 3 | - | 4 | 41 | 20 | 21 | 51 |
| 2 | B36 | 23 | 14 | - | 7 | - | 2 | 41 | 15 | 26 | 49 |
| 3 | HB | 23 | 13 | - | 3 | - | 7 | 53 | 30 | 23 | 42 |
| 4 | EB/S | 23 | 13 | - | 3 | - | 7 | 39 | 27 | 12 | 42 |
| 5 | GÍ | 23 | 8 | - | 5 | - | 10 | 34 | 45 | -11 | 29 |
| 6 | KÍ | 23 | 8 | - | 4 | - | 11 | 38 | 39 | -1 | 28 |
| 7 | Skála | 23 | 8 | - | 4 | - | 11 | 24 | 34 | -10 | 28 |
| 8 | B71 | 23 | 7 | - | 5 | - | 11 | 34 | 42 | -8 | 26 |
| 9 | AB | 23 | 4 | - | 5 | - | 14 | 28 | 46 | -18 | 17 |
| 10 | VB/S | 23 | 2 | - | 5 | - | 16 | 23 | 57 | -34 | 11 |

B36-Skála 1-1 (0-0):

# Skýmligar FM-vónir

**Hóast Skála sat á tí mesta, eftir at B36 heldur óneyðugt misti ein spælara, so skuldi ein verjuvilla til, áðrenn Slavisa Kaplanovic fekk tikið dýrabær stig frá vertunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*B36*

*Skála*



*Sylla var størsta atvoldin til høvuðbrýggj í Skála-verjuni. Her fær Pætur Dam Jacobsen gult kort fyri at taka beinini undan ivorianunum hjá B36*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

At spæla fótbóltsdyst í fremstu deildini klokkan 19, nú september mánaður er meira enn hálvrunnin, gevurikkibestufortreytirnar fyri góðum fótbóltsspæli.

Hetta var eisini sjónligt longu fyrstu løtuna av dystinum í Gundadali. Longu við dystarbyrjan var hálvgum skýmligt við vøllin, og hóast stóru projektørarnir á mastrunum vórðu tendraðir, so liva hesar á ongan hátt upp til altjóða krøvini, hvat hesum viðvíkur.

Og hetta sást eisini aftur í spælinum. Kanska var tað vantandi frálæra í náttarferðslu, sum gjørdi um seg, men í øllum førum høvdu spælarar á báðum liðum ógvuliga trupult við at finna hvønannan. Leikferðin kom av tí sama sjáldan í hæddina, og beinleiðis skeivu sendingarnar vóru mest sum óteljandi.

### Dýrt kort

Spakuliga vann B36 sær tó eina yvirvág, og í stórt korter um miðjan hálvleikin áttu teir eisini at fingið hol á. Men avgerandi neyvleikin var tó ikki við teimum, hóast teir spældu seg til fleiri góðar støður. Ikki minst, tá Sylla fleiri ferðir bant alla Skála-verjuna við sínum renningum, áðrenn bólturin varð sendur víðari.

Seinasti parturin av fyrra hálvleiki gjørdist tó heldur dovin, men beint undan seinasta brikslinum kom dramatikkur í. Mikkjal Thomassen hevði undan hesum fingið gult kort at keglast við dómaran, og tá hann so eisini kom upp at keglast við mótstøðumann, fall hamarin hart.

Tað gav Skála ein fyrimun seinastu trý korterini, og tað tóktist eisini, sum ætlaðu teir at taka av hesum. Uttan at flyta fólkið ov langt fram, løgdu teir eitt støðugt trýst á B36, sum fyri tað allar mesta nú var í verjustøðu. Og ofta vóru vertirnir eisini somikið sperdir, at bólturin bara varð sparkaður burtur, tá hesin varð vunnin við tí úrsliti, at Skála alt fyri eitt aftur kundi fara undir nýtt álop.

B36 royndi tó eisini at bíta frá sær, og 17 minuttir eftir steðgin komu teir á odda. Santos hevði júst havt eitt drøn av einum frísparki, sum brast í stólpan heilt uppi við tríkantin. Hesa ferð legði hann fríspark innfyri úr vinstru. Nógvir mans fóru upp eftir bóltinum, men eingin teirra nart kúluna, sum umvegis handara stólpan legði seg til rættis í meskunum.

Var trýstið stórt undan hesum, so legði Skála nú enn meira fyri. Ferð eftir ferð megnaðu teir at spæla seg út um kantarnar hjá undirmannaða heimaliðnum, og vandastøðurnar gjørdust heilt nógvar. Eisini til B36, sum nú fekk fleiri góðar kontramøguleikar.

Trýstið tóktist tó vera hæsað av, tá útjavningin stakk seg upp úr mest sum Slavisa Kaplanovic, og so kundi hesin prika inn um Jákup Mikkelsen til 1-1.

### Mistu sambandið

Hóast B36 í eini desperatari roynd at vinna flutti nógv fólk fram seinastu løtuna, so stóð úrslitið ikki at vika. Eitt úrslit, sum her og nú hevur við sær, at NSÍ framvegis er einsamalt oddalið í Formula-deildini.

Fyri Skála kundi einsamalla stigið kanska ikki nýtast til so nógv. Men tað prógvaði, at liðið ikki tykist rakt av teirri líkasælu, sum ofta kann eyðkenna eitt lið í miðjuni, tá kappingin nærkast endanum. Og í øllum førum fingu teir rætt eina stóra hjálpandi hond tvørtur um fjørðin til kommunalu sambúgvarnar.

## FAKTA

**B36-Skála 1-1 (0-0)**
**1-0:** Alex José dos Santos, 62.
**1-1:** Slavisa Kaplanovic, 82.
**Dómari:** Jens Petur Brattalíð
**B36:** Jákup Mikkelsen – Johan V. Gunnarsson, Herbert í Lon Jacobsen, Fróði Benjaminsen, Alex José dos Santos – Heini í Skorini (Bergur Midjord, 81), Klæmint Matras, Ingi Højsted (Oddmar Færø, 58.), Mikkjal Thomassen, Hanus Thorleifsson – Amed Davy Sylla
**Gult kort:** Ingi Højsted, Mikkjal Thomassen
**Reytt kort:** Mikkjal Thomassen (tvey gul)
**Skála:** Predrag Markovic – Bárður Danielsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Teitur R. Joensen – Alexandur Johansen, Pætur D. Jacobsen, Levi Hanssen, Bogi Gregersen (Erland B. Danielsen, 90.), Debes Danielsen (Poul N. Poulsen, 81.) – Obele Okeke Onyebuchi (Slavisa Kaplanovic, 70.)
**Gult kort:** Pætur Dam Jacobsen, Rúni Rasmussen, Slavisa Kaplanovic, Poul N. Poulsen, Milic Curcic

## Trívast í Gundadali

Seinnu árini hevur Skála mest sum hvørja ferð havt stig við sær úr Gundadali. Og mánakvøldið kundi Bárður B. Danielsen bara staðfesta, at teir trívast so hampuliga væl í høvuðsstaðnum.

- Tað vísir seg soleiðis í øllum førum. Í dag haldi eg, at dysturin fyri tað nógva gongur júst so, sum vit ætlaðu. B36 er ikki eitt lið, sum tveitir nógv fólk fram í senn, og tí ráddi um hjá okkum at standa rætt.

- Eftir steðgin broytast fortreytirnar sjálvandi, og í yvirtali skuldu vit kanska fingið meira burturúr. Sæð burtur frá hasum frísparkinum hjá Santos, so haldi eg ikki, at teir tá skapa nakað yvirhøvur, so sjálvandi er tað keðiligt, at eitt slíkt mál skal fara inn. Vit megna so onkursvegna at javna kortini, og 1-1 var kanska eitt rímiligt úrslit.

Og er tað eitt úrslit, sum tit eru nøgdir um?

- Tað vildu vit so verið, um tú spurdi meg undan dystinum. Men júst nú iðra vit okkum um hatta málið hjá teimum. Men nú skylda vit so ikki NSÍ nakað, helt Bárður skemtandi fyri.

## Hava fult tamarhald

Javnleikurin var sjálvandi ikki eitt nøktandi úrslit hjá B36. Og tað var liðskiparin, Klæmint Matras, eisini skjótur at staðfesta.

- Tað er rætt, men vit gera tað trupult fyri okkum sjálvar. Vit hava fult tamarhald á dystinum, men so missa vit ein mann, og so verður tað tungt. Eg haldi tó, at vit stríðast serstakliga væl, men í seinasta enda megnaðu vit so ikki at halda fast.

Og tað kostar so fyribils oddasessin?

- Ja. Vit mugu sjálvandi framhaldandi royna at gera okkara. Men nú er tað ikki nóg mikið. NSÍ skal so snáva onkra staðni á vegnum, so tað mugu vit bara vóna, at teir gera, segði Klæmint.